# Hálvurannar tími í heilsun



**– Tá íslendingar kunnu, hví kunnu vit so ikki? Tað er eingin, ið ger tað fyri okkum! Heimurin er so fullur av møguleikum, at tað er bara ein spurningur, hvat tú brúkar orkuna til, sigur Jákup á Dul Jacobsen, sum í vikuni avdúkaði, at hann ætlar at fara undir størstu byggiætlan í Føroya søgu. Sjálvur er hann hálvanannan tíma um dagin í eini heilsumiðstøð, tí tað er við til at geva honum nýggj hugskot og íblástur, og hetta sigur hann seg ikki kunna vera fyriuttan**

SAMRØÐA
*Theodor E. D. Olsen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Hetta var vikan, tá Føroya størsta byggiætlan varð avdúkað. Stóratjørn eitur projektið, sum skal hýsa hotelli, íbúðarblokkum, stórhandlum og alskyns ítróttarhentleikum við t.d. skoytuhøll, sum føroyingar ongantíð áður hava havt atgongd til.

Maðurin aftan fyri verkætlanina er føroyingurin Jákup á Dul Jacobsen, sum longu fór avstað aftur úr Føroyum í dag, eftir at hava lagt sínar ætlanir fram fyri føroyska almenningin á Hotel Føroyum í gjáramorgunin.

Hann hevði nógv um at vera hósdagin. Fartelefonin kimaði við jøvnum millumbilum við boðum, sum hann svaraði á bæði íslendskum og føroyskum, og almennir og hálvalmennir stjórar mólu rundan um hann, sum flogkykt um mykju.

Sjálvur tóktist hann kortini ikki at vera stórvegis órógvaður av øllum hóvastákinum, hóast føroysku bløðini høvdu ruddað forsíður og opnur fyri hansara ætlanum í Hoyvíkshaganum, og umrøðurnar so at siga bara hava verið jaligar.

Jákup tekur tað púra róliga og bjóðar okkum ein kaffimunn, tá vit hitta hann til eitt prát, og hóast tann stríputa skjúrtan er knappað, er talan í øllum førum um ein mann, sum í fluttum týdningi hevur brotið upp um armar. Skógvarnir hjá honum síggja út til at vera nýpussaðir, men slipsi er hann ikki í. Og tað var hann forrestin heldur ikki á tíðindafundinum, tá fjølmiðlarnir vórðu presenteraðir fyri størstu byggiætlan í Føroyum nakrantíð. Her er talan um ein mann, ið eftir øllum at døma fær tað at rigga og bera til.

Ella sum hann sjálvur sigur:

– Eg elski tað, eg geri!

Sambært Jákupi er tað nevniliga ikki tann stóri munurin at stjórna trimum handlum ella 143, og samstarvsfelagin hjá honum, Nils Stórá, er skjótur at taka undir við honum og siga, at Jákup ikki er broyttur seinastu árini, hóast upphæddirnar, hann hevur keypt og selt fyri, kunnu tykjast ørandi hjá summum, og at hann um stutta tíð helst eigur bæði longsta og hægsta hús í Íslandi. Tað seinna er tó ikki heilt vist, tí myndugleikarnir skulu fyrst góðkenna, at tað ikki verður til ampa fyri flogferðsluna við sínum 26 hæddum. Jú, sjálvt í harðførum hæddum, finnast jarðbundin fólk.

– Tann einasti munurin er, at eitt sindur størri tøl eru á botnlinjuni nú, sigur Jákup á Dul Jacobsen, ið læt tann fyrsta Skemmuhandilin upp á Hálsi í Havn í 1986.

Áðrenn tað hevði hann siglt í nøkur ár, men uppilagstur fór hann í holt við at selja dýnur og annað til húskið. Sjálvur sigur hann, at hóast hann má viðganga, at tað hevur gingið skjótt í seinastuni, so fer tað at henda líka nógv í ár, sum tey seinastu tíggju árini.



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevur lovað at veita Jákupi jaliga viðgerð í Tórshavnar býráð*

### Fólkið skal støðast

Jákup viðgongur, at hann er nógv ávirkaður av íslendingum og teirra hugsunarhátti eftir at hava búð í Reykjavík í nøkur ár. Men hann velur eisini at venda hesum til føroyskan fyrimun.

– Tá íslendingar kunnu, hví kunnu vit so ikki, spyr Jákup, sum annars fyri nøkrum árum síðani hevði ætlanir um at fara undir stórt handilsvirksemi í Klaksvík, men hetta varð tó av ongum.

– Tað er eingin, ið ger tað fyri okkum! Heimurin er so fullur av møguleikum, at tað er bara ein spurningur, hvat tú brúkar orkuna til, og vit vilja vera, har tað er gleði, sigur Jákup, ið og fegnast ta góðu móttøkuna, ætlan hansara hevur fingið – m.a. ynsktu bæði Sosialurin og Dimmalætting honum góða eydnu í oddagreinunum í gjárkvøldið.

Tað er ikki meira enn ein mánaður síðani Tórshavnar býráð frætti um hesar ætlanir, og tá var tað uttan ítróttarøkini, men haðani hevur eftir øllum at døma ikki vælvild skortað. Jákup sigur seg nevniliga ikki ynskja, tað hann kallar konfliktir, og sigur varliga, at hann so helst ikki komið við hesum ætlanunum.

– Vit vilja Føroyum tað besta, og tað er tí vit koma við hesum, sigur Jákup.

Hann viðgongur tó, at talan sjálvandi er um eina forrætning. Tað var hann meira afturhaldin við at viðganga á tíðindafundinum fyrrapartin í gjár. Hinvegin vil hann vera við, at ítróttarøkið og kanska serliga svimji- og fótbóltshøllin neyvan fara at geva yvirskot, men at hann vil vera við til at byggja bæði handilsøki og ítróttarøki fyri at geva kommununi nakað aftur, eins og hetta er við til at skapa eitt livandi umhvørvi uppi á Stórutjørn, har fólk skal støðast.

Á tíðindafundinum legði Jákup nevniliga alstóran dent á týdningin av, at familjan er saman í frítíðini, og at tað ofta ikki ber til at halda menninar til á einum staði, um konurnar hjá teimum ikki trívast – tað vísa dømi aðrastaðni - og Stóratjørn skal tí vera við til at fáa nakrar av teimum 20.000 føroyingunum, sum mett verður búgva uttanlands, heimaftur.

Jákup sigur nevniliga, at frítíðin fær størri og størri týdning, og at tað tí er neyðugt at føroyingar fáa somu lívsdygd, sum okkara grannatjóðir.

### Ov vánaligt ferðasamband úr Føroyum

Útisetin Jákup væntar tó